# Sjúk glasgenta varð innløgd 70 ferðir

**10. oktober er altjóða sálarheilsudagur. Og hesin merkisdagur fór ikki aftur við borðinum hjá teimum, sum hava áhuga fyri sálarsjúkum. Allan týsdagin vóru omanfyri 60 fólk á temadegi á Landssjúkrahúsinum í hesum sambandi. Evnið var Recovery - hvussu ein kemur fyri seg aftur eftir eina sinnissjúku og hvørji amboð, sum heilsuverkið hevur í slíkum førum**

SÁLARSJÚKA
*Orð og myndir:*
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*


*Ta einu tíðina hevði Jan Nielsen ta sjúku Karin Dyhr í sínum terapeutisku hondum. Hetta gav kortini úrslit, tí Karin nú er frísk*

**Havn:** Til henda temadagin hevði tað eydnast at fáa fatur á tveimum serkønum og rættiliga serstøkum fólkum úr Danmark - terapeutinum Jan Nielsen og fyrrverandi sjúklinginum, Karin Dyhr.

Í framløgum sínum vístu tey á, hvussu stóran týdning samrøðan hevur millum viðgerðara og tann sjúka, meðan arbeitt verður við at vinna sjúklinginum sálarliga førleikan aftur.

- Hetta evnið hevur sum vera man eisini okkara stóra áhuga. Tí fegnist eg um, at vit kundu vera so mong, og frá so ymiskum støðum, sigur Soffi Egholm, forkvinna í felagnum Sinnisbati, sum skipaði fyri degnum í samstarvi við Landssjúkrahúsið.

Við á skeiðnum vóru m.a. starvsfólk á Psykiatriska Deplinum á Landssjúkrahúsinum, eins og fólk frá heimarøktini og kommununum kring landið.

- Tað er týdningarmikið at vit øll tosa sama mál, tá tað snýr seg um slíkar spurningar, sigur Soffi.

Tað sum serliga gjørdi henda temadagin so framúr góðan vóru teir báðir donsku undirvísararnir. Serliga søgan hjá teirri sjúku, men nú frísku Karin vakti ans og gav øllum nakað av hugsa um.

### Ringja 30 ferðir um vikuna

Karin var borin heim í 1947 og er útbúgvin tónleikaterapeutur, men mátti í 1977 gevast sum slík, tí hon var vorðin so mikið sjúk sálarliga at hon ikki megnaði at passa arbeiðið sítt.

Úrslitið av hesum var, at hon varð innløgd á sinnissjúkrahús í Danmark samfullar 70 ferðir tey næstu 17 árini. Trupult tyktist eisini vera at geva henni eina veruliga diagnosu.

Hon kom m.a. til persónligar samtalur hjá terapeutinum Jan Nielsen, og á framløguni týsdagin skiltist at tey høvdu havt eitt rættiliga tætt og opið samband øll hesi árini, bæði við samtalum undir fýra eygum og umvegis telefonina.

- Sambandið millum okkum var so gott, at eg segði við Karin at hon kundi ringja til mín nær tað skuldi vera. Ta einu vikuna gav eg henni loyvi til ringja, sjálvt um tað so var 30 ferðir!, segði Jan.

### Stórt stig

Fyri Karin sjálva var tað eisini eitt slag av yvirvinnilsi at taka við hesum ótrúliga tilboðnum frá viðgerara sínum.

- Tað var eitt stórt stig hjá mær at skula ringja til hansara. Tað var av sonnum at fara langt út um mark. Men soleiðis gjørdu vit altso.

- Ja, hann plagdi at siga, at eg kundi ringja nær tað skuldi vera. Var hann ikki inni, so segði kona hansara bara at hon skuldi bera boðini víðari, greiddi Karin frá.

Tað vísti seg kortini, at hon ikki ringdi so ofta sum ein kundi stúrt og borið ótta fyri: Tað tóktist, sum bara vitanin um henda møguleikan gav henni trygg-leika.

Gjøgnum hesar samtalur kom so við og við fram, hví støðan var vorðin soleiðis hjá Karin: Kynslig misnýtsla, umsorganarsvík, harðskapur og annað høvdu gjøgnum øll barnaárini sett sítt merki á tað nú tilkomnu Karin.

### Ikki einsamøll

Eitt drúgvt tíðarskeið gekk til Karin umsíðir kundi staðfesta, at hon var vorðin fullkomuliga grødd frá sjúku sínari.

Hvussu hetta bar til og hvussu víðari hevur gingið henni, ynskti hon ikki at halda fyri seg sjálva.

Saman við eini aðrari kvinnu setti hon seg niður at skriva eina skaldsøgu um alt tað, sum henni hevði verið fyri. Skaldsøgan kom út fyri tveimum árum síðani og fekk heitið Glaspigen.

Hon snýr seg um ta 29 ára gomlu gentuna Ida, sum er vorðin kynsliga misnýtt øll barnaárini av pápa sínum. Fylgjandi árini verður hon innløgd á sálarsjúkrahús í samfullar 70 ferðir, men følir ikki at henda skipanin skilir hana til fulnar.

Hon hittir tó ein terapeut - áðurnevnda Jan Nielsen - sum í bókini ber heitið Kim. Og út frá samrøðunum teirra millum lýsir bókin, hvussu hon at enda kann standa fram sum tann hon er í dag.

### Eingin fyrigeving

Bókin fekk sum vera man góða móttøku, og er í løtuni til endurprentingar.

Á temadegnum fingu teir 60 áhoyrararnir tí eitt sera gott høvi at hoyra hana greiða frá síni lívssøgu, samstundis sum Jan greiddi frá sínum upplivingum við Karin.

Ein spurningur, sum hon ofta hevur fingið er, um hon kann fyrigeva pápanum tað sum hann hevur gjørt. Pápin doyði fyri fleiri árum síðani.

- Eg eri kristin, men fyrigeva honum, - nei, tað kann eg ikki. Eg ætli mær at gera tað, tá vit møtast aftur hinumegin deyðan, var svar hennara til henda spurningin.

## Sagt um Glaspigen

- Hetta er tann mest ræðuliga og samstundis mest grípandi bókin, sum eg nakrantíð havi lisið. Tað er í roynd og veru ein skakandi veruleiki sum verður lýstur her um ferðina hjá gentuni Idu gjøgnum lívið við kynsligari misnýtslu, sálarsjúku og innlegging á sinnissjúkrahús, skrivar tíðindakvinnan Lotte Gerdes í sínum ummæli av bókini.

Og hon leggur aftrat í sama andadrátti:

- Tú heldur líkasum ondini, meðan lagnan hjá Idu verður víst fram lið um lið við tabu'ini. Hetta er ein reinur gysari har ein - eins og Ida sjálv - veruliga ynskir at alt bara er lygn, og at alt bara er psykotiskt fantasi og sjúkligur heilaspuni. Men tað er tað altso ikki, skrivar Lotte.

Meiri kann lesast um Karin Dyhr, bókina og samrøðurnar á heimasíðuni www.glaspigen.dk


*Omanfyri 60 fólk luttóku á temadegnum sum Sinnisbati skipaði fyri. Tey lurtaðu við áhuga – og tá ein hoyrir frásøgnina hjá Karin, so skilir ein eisini hví!*